# 31. januar verður ein lúsadagur

**31. januar er ásettur at vera almennur lúsadagur í fleiri Norðurlondum**



**LÚSADAGUR**
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Óansæð veður og vind verður 31. januar ein lúsadagur í Føroyum. Tá verður nevniliga farið undir eina umfatandi herferð móti lýsnum – lúsakríggj – kring um í landinum og í fleiri av hinum Norðurlondunum.

- Lýs er vorðin ein stórur trupulleiki fyri smábørn, skúlabørn og vaksin, sigur Gigni í tíðindaskrivi.

Gigni, Heilsufrøði til børn og ung og Apoteksverk Føroya eru tí farin í samstarv um eitt landsumfatandi átak um at basa lús. Átakið nevnist 'Lúsakríggj' og verður tann 31. januar 2010.

- Vit vilja við hesum varpa ljós á lýs, bæði í fjølmiðlunum og á øllum barnagørðunum í landinum sama dag, sigur Gigni í tíðindaskrivi.

Øll barnagarðsbørn fara tí í hesum mánaðinum at fáa hvør sín posa við lúsakambi og faldara við kunning um lús og viðgerð.

Fyri at steðga smittuni av lýs er neyðugt, at øll børn verða kannaði sama dag.

- Tí fara vit við hesum átaki at heita á foreldur um at kemba barni teirra vikuskifti 31. januar 2010, verður sagt í tíðindaskrivinum.

Í nógv ár hava lýs verið ein endaleys plága hjá foreldrum, børnum, skúlum, barnagørðum og arbeiðsplássum.

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen greiðir frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Stormur av landsynningi og stundum regn. Móti kvøldið upp í hvassann storm av útsynningi og ælingur. Hitin millum 7 og 10 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Strúkur í vindi ella hvassur vindur av útsynningni, seinnapartin minni vindur. Sólglottar, men eisini ælingur og hitin millum 6 og 9 stig.




**Veðrið mánadagin:**
Gul til stívt andøvsgul av útsynningi og sólglottar, men kanska okkurt ælið. Hitin millum 5 og 8 stig.

**Veðrið týsdagin og mikudagin:**
Týsdagin upp í stívt andøvsgul av útsynningi og yvirhøvur turt. Mikudagin upp í hvassan vind av suðri og regn. Hitin millum 6 og 10 stig.

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | -10 |
| Nuuk | 0 |
| Qaqortoq | 2 |
| Ammassalik | -7 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 1 |
| Seyðisfjørður | -1 |
| Tórshavn | 1 |
| Lerwick | 2 |
| Aberdeen | 0 |
| London | -1 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | -7 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | -6 |
| Keypmannah. | -4 |
| Helsinki | -17 |
| Moskva | -7 |
| Berlin | -5 |
| Warzawa | -5 |
| Kiev | 0 |
| Bukarest | 0 |
| Paris | -4 |
| Madrid | 1 |
| Róm | 12 |
| Malorca | 11 |
| Athen | 17 |
| Malta | 19 |
| Tunis | 19 |
| Beijing | -7 |
| New Dehli | 10 |
| Bangkok | 30 |
| Jakarta | 25 |
| Sydney | -- |
| New York | 2 |
| Miami | 9 |
| Los Angeles | 17 |
| Meksikobýur | 16 |
| Panama | -- |
| La Paz | 11 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 25 |

## LUFTTRÝSTIÐ

Síðstu nátt:



Komandi nátt:



**Síðstu nátt:**
Eitt lágtrýst, 975 hPa. Sunnan fyri Ísland fer í útnyrðing.

**Komandi nátt:**
Stormlágtrýstið sunnan fyri Ísland fer spakuliga norðureftir og dýpist framvegis. Brúgvaløgini haðani verða við Føroyar komandi samdøgur.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 07/01 kl. 06⁰⁰ – 08/01 06⁰⁰. Hitin í gjár: -0,6°
Minsti hiti máldur í januar: -10,5° -
Mesti hiti máldur í januar: +13,7°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 03/01 kl. 06⁰⁰ – 04/01 06⁰⁰.
Avfallið higartil í januar: 10 mm

## VESTFALLSKYRRINDI

15. januar: Tendring
17. januar: Mánin longst frá jørðini

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 15. jan | 06:45 | 19:09 | 05:45 | 18:09 | 06:00 | 18:24 | 08:45 | 21:09 | 09:45 | 22:09 | 05:00 | 17:24 | 04:00 | 16:24 | 07:00 | 19:24 | 08:00 | 20:24 | 06:30 | 18:54 | 07:45 | 20:09 |
| 16. jan | 07:29 | 19:50 | 06:29 | 18:50 | 06:44 | 19:05 | 09:29 | 21:50 | 10:29 | 22:50 | 05:44 | 18:05 | 04:44 | 17:05 | 07:44 | 20:05 | 08:44 | 21:05 | 07:14 | 19:35 | 08:29 | 20:50 |
| 17. jan | 08:10 | 20:30 | 07:10 | 19:30 | 07:25 | 19:45 | 10:10 | 22:30 | 11:10 | 23:30 | 06:25 | 18:45 | 05:25 | 17:45 | 08:25 | 20:45 | 09:25 | 21:45 | 07:55 | 20:15 | 09:10 | 21:30 |
| 18. jan | 08:47 | 21:05 | 07:47 | 20:05 | 08:02 | 20:20 | 10:47 | 23:05 | 11:47 | - | 07:02 | 19:20 | 06:02 | 18:20 | 09:02 | 21:20 | 10:02 | 22:20 | 08:32 | 20:50 | 09:47 | 22:05 |
| 19. jan | 09:22 | 21:39 | 08:22 | 20:39 | 08:37 | 20:54 | 11:22 | 23:39 | 00:05 | 12:22 | 07:37 | 19:54 | 06:37 | 18:54 | 09:37 | 21:54 | 10:37 | 22:54 | 09:07 | 21:24 | 10:22 | 22:39 |

Kelda. Álmanakkin 2010




